# Sigmar Johannesen 75 ár



23. august 2006 fylti Sigmar Johannesen í Havn 75 ár. Sigmar er føddur við Norðskála og var yngstur av 7 systkjum, foreldur hansara vóru Elsa, f. Joensen, frá Norðskála, og Johannes Johannesen úr Tjørnuvík.

Eftir sjey ára skúlagongd fór Sigmar til skips. Tey fyrstu árini sigldi hann við sluppum og var m.a. við Westvard Hoo, sum mammubeiggin Marius førdi. Seinni fór hann til Íslands, har sigldi við einum trolara, ið kallaðist July.

Ein sertøk hending sum Sigmar hevur verið úti fyri, var einaferð teir skuldu fara til Grønlands at fiska. Við á túrinum vóru 13 mans og var farið var fríggjadag 13. Hetta var lítið hildið um millum heimafólkið, at bróta slíkan sið og útfordra lagnuna.

Túrurin yvir gekk væl, og teir høvdu sera gott fiskarí. Men aftaná 14 dagar gekk so galið, skipið rendi upp á eitt sker, og manningin noyddist at fara í bátarnar. Eftir at hava róð í nakrar tímar, komu teir til eina lítla óbygda oyggj. Her vóru teir eina heila viku á hesum oydna stað, uttan at hava nakað størvegis til matna og at drekka.

Ein dagin siggja teir, at ein maður kemur rógvandi við kajakk framvið, og rópa allir menn um hjálp. Maðurin í kajakkini varnast teir og kemur inn til teirra. Hann fór inn á fastlandið eftir hjálp, og komu allir heilskapaðir frá hendingini. Hesu søgu hevur Sigmar mangan fortalt, og sigur at man ikki eigur at gera gjøldur burtur úr pátrúgv.

Men eftir nøkur ár sjónum avgjørdi Sigmar at gerast landkrabbi. Fyrstu árini arbeiddi hann hjá Thomas Dam. Seinni fór hann at koyra bussin hjá Óla Arge (Bil Óla). Onkur helt skemtandi fyri, at minsti maður í Havn skuldi koyra størsta bilin í býnum. Sum tíðarnar batnaðu í 60-unum, avgjørdi Sigmar at keypa sær ein lastbil, og varð hetta hansara lívsstarv. Hann arbeiddi fleiri ár hjá E. Pihl & Søn við sínum egna lastbili, og var hann sera væl lýddur í sínum starvi. Hann er sera røkin og hevði altíð vælhildnar bilar.

Í 1972 gjørdist Sigmar sjeyndadags adventistur, og hevur hann m.a. verið umboð í skúlaráðnum í Adventistaskúlanum í fleiri ár.

Sigmar er giftur við Emmu f, Viderø, úr Havn, dóttir Birgitte f. Joensen, vanliga nevnd Birtha, og Niels Johannes Viderø, bæði av Viðareiði og búsettust í Havn.

Sigmar og Emma eiga ein son, Birgir, ið er giftur við Agnieszku úr Pólandi, og eiga tey tvey børn: Emmu og David Sigmar. Nú Sigmar er vorðin pensionistur, brúkar hann nógva tíð saman við abbabørnunum, og eisini eru stundir til at røkja tann vakra urtagarðin við Hoydalsvegin.

Við hesum orðum ynskja vit Sigmar nógv góð ár framyvir við ynski um Guds ríku signing.

**Familjan**

# Pól Jóhannus Poulsen 75 ár

Tann 18. september verður Pól Jóhannus Poulsen 75 ár. Øll sum kenna hann og hansara nærmastu kalla hann Hannus.

Hannus er føddur við Ljósá, og eru foreldur hansara: Poulina Joensen, ættað úr Leirvík og Sofus Poulsen, frá Ljósá. Brøður hansara eru: Andrias og Elmar. Fyri meg sum yngstur var og er Hannus ein »myndugleiki«, sum eg respekteraði.

Flest øll mannabørn hava eina lívssøgu, ljósa og døkka. Hjá Hannus vigar tann ljósa meira, haldi eg. Tó hann kendi lívsins álvara tíðliga í tíðini – tá menn fórust av krígsávum, eisini nærmast í familjuni. Hann hevur kent álvarsemi í vandasigling – við yvirfyltum skipi heim úr Grønlandi. Var við »Havfúnni«, sum fór á land undir Íslandi á Eysturlandinum, nær við Siglufjørðin, í 1949. Misti bátin í 1967, sum var smíðaður í Hvalba, seksæringur, sum kallaðist »Hjallur«. Tá tað hendi, komust brøðurnir undan og bjargaðu sær upp á stein tætt við, har Risin og Kellingin standa.

Sagt er frá, at har »Havfrúgvin« fór land, er forberg og eingin møguleiki fyri bjarging, uttan hjálp frá landi av. Eisini er komið fram, at henda dagin, neyðarkall varð sent frá neyðstanda skipinum – hoyrdi vaktarmaðurin á støðini, beint áðrenn hann skuldi fara heim, eitt einasta »signal« frá neyðstøddu monnunum – veikt var tað eisini, men so mikið, at hann fekk samband við skipið, og vóru allir bjargaðir.



Hannus sigur, at hann hevði eina lummalykt í lummanum, tá hann fór í »bjargingarstólin«, sum bleiv drigin gjøgnum brotini, har flest allir fóru undir í brotunum. Men tá hann kom í land, var lyktin horvin...

Hendingin talar fyri seg sjálva – ómetaliga grípandi og ávarandi. »Bjargingarmaðurin« hoyrdi eitt einasta – og seintasta neyðarkall. Dagarnir hjá hesum monnum vóru sostatt ikki taldir.

Hannus var í Grønlandi, tá pápi hansara doyði á sumri í 1950, bert 53 ára gamal. So Hannus kom í faðirs stað – við tí hjálp sum var neyðug til lívsins uppihald. Tað skal tú hava tøkk fyri.

Hannus giftist í 1957 við Elin Mortensen úr Sørvági, og búsettust tey við Ljósá, í húsunum sum pápin bygdi. Hon er honum ein góður hjúnarfelagi. Tey eiga fýra gentur og ein drong. Barnabørnini eru 11 og eitt langabbabarn.

Saman við Andriasi áttu teir »Reynir«, sum teir róðu út við í mong ár og fiskaðu rættiliga væl. Fyrsta skipið, Hannus fór við, var »Riddarin«, ein slupp. Síðani hevur hann verið við mongum skipum, bæði stórum og smáum, norskum og týskum trolarum.

Møguleikarnir góvust at kunna vera heima, og tað var familjan glað fyri.

Hannus er til reiðar, tá seinasta »útkall« kemur – og hann verður tikin upp í dýrd. Tað verður ikki gjøgnum »brotasjógvar« og tað himmalska »ljósið« fer ikki úr lummanum.

Ein onnur og ljósari strond, vit lenda á, enn tær knortlutu her. So vit skilja, at »saman við nøgdsemi, er gudsóttin stórur vinningur«.

Vaktarmaður okkara svevur ikki. Tann ljósa síðan vinnur rættiliga á tí døkku.

Øll í okkara familju ynskja tær hjartaliga tillukku og alt tað besta.

**Elmar**






Føroya Filatelistfelag:

# Framsýning við heimsins fyrsta frímerki

Mánadagin 18. september kl. 20 hevur Føroya Filatelistfelag fund í Sjúrðagøtu 20.

Til henda fundin hevur felagið fingið fatur á fyrsta frímerki nakrantíð "The Penny Black", sum var sýnt fram fyri almenninginum fyrstu ferð 10. januar 1840. Tað kom tó fyrst í brúk 6. mai 1840. Merkið ber mynd av kendu bretsku drotningini, Victoriu, sum ráddi frá 20. juni 1837 til sín deyða 22. januar 1901.

Maðurin, ið gjørdi hetta fyrsta merki æt Rowland Hill (1795-1879), og samstundis reformeraði hann allan postflutning.

Longu 8. mai, tveir dagar seinni, kom út næsta frímerki, nevniliga : "Two-Pence Blue" , eisini av drotning Victoriu.



*Fyrsta frímerki nakrantíð sum var sýnt fram fyri almenninginum fyrstu ferð 10. januar 1840*

Frá Føroya Filatelistfelag verður sagt, at fólk eru vælkomin inn á gólvið mánakvøldið at síggja hetta forkunnuga frímerki, sum er tað fyrsta nakrantíð.


M Ó T T Ø K A



Í samband við at nýggi dagstovnurin í Sørvági er tikin í nýtslu, verður boði til almenna móttøku á dagstovninum,

Klóadalsvegur 1
leygardagin 23. september
frá kl. 14 til kl. 16

Í hesum sambandi verður navnið á dagstovninum kunngjørt.

Sørvágs Kommuna
www.sorvag.fo